# Kunngerð

## um broyting av Byggisamtyktini og Býarplaninum fyri Runavíkar Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013, verður við hesum boðað frá, at Runavíkar býráð á fundi hevur samtykt uppskot til broytingar í býarplaninum og byggisamtyktini fyri Runavíkar kommunu.

**Broytingar av býarplaninum:**

- **Matr. nr. 39, 40 og 41 við Kráarrás í Rituvík verður broytt frá E1-øki til B25-øki**
- **Eitt økið á uml. 200 m$^2$ við kirkjugarðin í Funningi verður broytt frá B41-øki til C39-øki**
- **Víðkan av B46-økinum í Funningsfirði við uml. 600 m$^2$ suðureftir**
- **Uml. 2.500 m$^2$ av E1-øki við Byrgisvegin í Søldarfirði verður broytt til B12-øki**
- **Uml. 2.200 m$^2$ av C20-økinum við Dagtilhaldið á Skála verður broytt til B21-øki**

**Broyting av byggisamtyktini:**

- **Byggisamtyktin fyri D-neystaøki verður broytt fyri neyst sum standa uttanfyri neystøki, at verða viðgjørd sum D-neystaøki.**
- **Broyting av ásetingum um hædd av bygningum í D31-økinum á Rituvíkshálsi**

Uppskot til broytingarnar í byggisamtyktini og býarplaninum eru til skjals á Býráðsskrivstovuni í Saltangará í upplatingartíðini í tíðarskeiðnum

**frá 15. apríl til 4. juni 2019.**

og á heimasíðuni www.runavik.fo

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu verða býráðnum í hendi í seinasta lagi 4. juni 2019.

**Runavíkar býráð**